# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt torført val

Spurningurin, hvussuleiðis Føroya Banki á bestan hátt verður einskildur, er ein sera áhugaverdur og stórur spurningur og hartil eitt torført politiskt val. Hesin spurningur er fyrst og fremst ein politiskur spurningur, tað vil siga ein spurningur av stórum almennum áhuga. Uttan mun til, at formelli ánarin er Fíggingargrunnurin, so er bankin almenn ogn. Hann gjørdist almenn ogn á sama hátt sum so mangar aðrar privatar fyritøkur, nevniliga sum ein kreppuloysn og ikki sum eitt úrslit av einari tilætlaðari politiskari tilgongd við nationalisering ella tjóðnýting fyri eygað.

Tað var altso samfelagið ella borgarin í Føroyum og í Danmark, sum bjargaði bankanum, og tí eru sterkar kenslur uppií, tá avgerðin um einskiljing skal setast í verk. Hví skal bankin í heila tikið einskiljast? Spyrja mong. Er ikki gott, sum er og gevur hann ikki eitt gott íkast til landskassan? Spurningarnir eru viðkomandi, men samstundis settir til fánýtis. Politiska avgerðin um einskiljing er tikin. Avgerðin var í roynd og veru longu tikin, tá bankaloysnin varð framd í verki. So her vendist ikki aftur, og tað kann ein harmast um alt eftir politiskari sannføring.

So er spurningurin um leist ella myndil. Her eru tvey ymisk sjónarmið galdandi. Annað mælir til at fremja einskiljingina uttan avmarkingar, tí hesin leistur vil geva eigaranum, sum í roynd og veru er Føroya fólk sum mest burturúr. Henda framferð vil eisini vera meira í tráð við altjóðagerðina, sum krevur ein reint liberalistiskan leist. Einhvør onnur verkseting vil seinka eini neyðugari liberalisering av føroyska fíggjarmarknaðinum.

Hitt sjónarmiðið vísir á vandan við, at ein einstakur strategiskur íleggjari keypir bankan og sostatt fer avstað við t.d. helvtini av føroyska fíggjarmarknaðinum. Hetta kann hava óheppnar fylgjur á mangan hátt eitt nú við uppsøgnum, flyting av virksemi v.m. Tyngst vigar tó hetta, at vit missa búskaparpolitiskan og fíggjarpolitiskan avgerðarrætt til útlendska fyritøku og harvið gleppur okkum týdningarmikið politiskt amboð av hondum. Tjakið er sera áhugavert, men kemur neyvan at ávirka avgerðina, sum eftir øllum at døma er tikin, og tað merkir so aftur, at talan verður um avmarkaða sølu, og er hetta ivaleyst ein reint politisk avgerð. Hesum er einki løgið í, eftirsum bankin jú er almannafæ.

**Sosialurin**

## Føroyingar hava bert eitt flagg – harra Løgmaður!

**POUL MICHELSEN**
løgtingsmaður



Nú eri eg ikki so royndur í politikki, at eg ikki geri mistøk. Alt bendir á, at eg havi gjørt eitt mistak við at samtykkja fíggjarlógaruppskotið fyri 2007.

Eg vil tó ikki taka størri ábyrgd av mistakinum, enn eg veruliga havi. Eg havi verið í iva, um landsstýrið veruliga lumpaði orðingina um sendistovuna inn í viðmerkingarnar til fíggjarlógina, men eftir at hava lisið Bjarna Djurholm, eri eg sannførdur um, at hetta veruliga var so.

Tá fíggjarlógin var viðgjørd við 1. viðgerð í oktober var ongin sendistova at finna í fíggjarlógaruppskotinum.

Tann 19. december leggur fíggjarnevndin álit fyri tingið. Í álitinum er eftir øllum at døma komin ein orðing, sum eg ikki havi sansað.

Í 12. tíma hava hvørki fíggjarnevndarlimir ella tinglimir stundir at lesa allan tekst, og tí verður bert taltilfarið gjøgnumgingið.

Fíggjarlógin fyri 2007 varð samtykt í einum ruðuleika av rossahandlum, og tá uppskotið, seint á kvøldi tann 21. december, bleiv samtykt, vóru tað bert fáir, sum vistu av láturligu sendistovutekstini. Løgmaður og Djurholm vóru so tveir av hesum.

Tað er tí ov bíligt av teimum at goyma seg aftan fyri tær 32 atkvøðurnar í tinginum, sum bert hava samtykt taltilfarið. Her er ikki farið rætt fram. Og vitandi um, at so er, hevði tað sømt seg betri, um løgmaður rættaði mistakið og bendi málið inn á rætt. Men høpisleysa ætlanin um at gera eina danska sendistovu aftrat í Íslandi, heldur eftir øllum at døma ótarnað fram.

Men sum sagt, eg havi gjørt eitt mistak, og soleiðis sum løgmaður og Djurholm misbrúka tulkingina av viðmerkingunum í fíggjarlógini, er einasti møguleikin hjá mær at leggja uppskot fyri tingið og á tann hátt at royna at rætta mistak mítt. Hetta nevndi eg eisini í fyrstu grein míni "Hví so ússaligt?", at eg vildi gera, um landsstýrið ikki fann eina virðiliga loysn á málinum.

Eg vil so ikki hava ábyrgdina av skommini.

At Bjarni Djurholm í grein síni heldur, at eg bara geri hetta fyri at eftirrationalisera og at tekkjast ávísum veljarum, verður hann um. Eg haldi hinvegin at Djurholm ikki situr á aftasta bonki, tá tað snýr seg um at royna at tekkjast veljarum ella at eftirrationalisera mistøk.

Fyri mær snýr tað seg um, at føroyingar fáa eina sendistovu í Reykjavík, sum sømir seg føroyingum. Fyri mær er púra greitt, at sendistovuætlanin hjá løgmanni beinleiðis skaðar samvinnuna landanna millum.

Talan kann ikki verða um eina danska sendistovu aftrat – har er jú ein frammanundan. Talan má verða eina sendistovu, sum er undir føroyskun flaggi og skjaldrarmerki. Missa vit tignina við at gera hetta, so eru avleiðingarnar ógvuliga avmarkaðar og avgjørt til at bera. Føroyingar hava bert eitt flagg – so einkult er tað. Vit vera bert virdir, um vit virða okkum sjálvar og Merkið okkara. At virðingin skal finnast og tign føroyinga í Íslandi skal fáast við at balla okkum inn í danska flaggið, dugi eg ikki at skilja at nakar kann fáa seg til at halda.

Er tignin tað einasta, sum telur hjá løgmanni og Bjarna Djurholm, og hetta verður endin á málinum, vil eg skjóta upp fyri løgmanni, at hann setir sendimannin flaggleysan inn í eitt kustaskáp í kjallarin á donsku sendistovuni, og at vit ongantíð hoyra til hansara aftur.

Eg skal hinvegin bjóða íslendska konsilátinum og nýggja íslendska konslinum Eiður Guðnassoni at vera vælkomnan til Føroya. Ongin ivi er um, at íslandingar vera sjónligir í Føroyum á ein virðuligan hátt – hetta veit eg at íslendingar leggja áherðslu á.

## Avlúsingarskipan

**A. GUTTORM DJURHUUS**



Í minu ungu døgum, tá teldutøknin var við at taka seg upp, var nakað vit nevndu fyri avlúsing.

Tá var ikki gjørligt at fara til handils at keypa tey forrit, sum brúk er fyri. Forritini skuldi tú sjálvur framleiða. Teldutíðin var dýr, og fleiri stovnar vóru um hvørja teldu, sum høvdu lítla orku. Tað var umráðandi at fáa forritið so einfalt og feilfrítt, sum gjørligt frá byrjan. Tí varð forritið altíð fyrst royndarkoyrt til at avdúka møguligar feilir. Tað spardi tíð og pengar. Forritið fór í gjøgnum eina avlúsingarprosess varð sagt.

Málsligar villur av allahanda slag floyma inn yvir okkum, uttan at nakar hevur møguleika ella tímir at havast at. Tó so, um okkurt ber ber brá av íslendskum er Føroyamálsdeildin har við fremstafingri. Fyri neyðini, annars stjala teir eisini málið frá okkum.

Nú tað er komið so langt, hevði tað tá kanska verið eitt hugskot at koyrt alt, sum skal kunngerast, í gjøgnum eina líknandi avlúsingarskipan, sum er nevnd omanfyri. Og ávísar persónar eisini. Við framkomnari tøkni er einki at ivast í, at tað ber til. Har kundu teir verið serumviðgjørdir ímóti íslendsku sjúkuni, sum er hervilig virussjúka, ið smittar illa. Og fingið bollar fyri internationalismu, so teir gjørdist minni heimføðisligir

Her eru stjórin í útvarpinum og formaðurin í málnevndini sterkir kandidatar.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.